# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 2032.
# Tíðarskeið: 12/8-20/8 - 2020

**Fólk við frá Havstovuni:** Jákup P. Dam, Poul Vestergaard, Sigvald Kristiansen, Heri Kallsoy og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var seinni túrurin av yvirlitstrolingunum á landgrunninum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt varð vekt, tal og longdarbýti skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini vórðu magakanningar gjørdar av toski, hýsu og upsa, umframt av øðrum fiskasløgum. Hitin í sjónum var máldur við miniloggarum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Miniloggarar at máta temperatur.

**Um túrin:** Vegna koronasjúkuna var túrur 2032 eitt beinleiðis framhald av túri 2030 uttan at fara til lands at landa. Túrurin byrjaði á Mýlingsgrunninum. Vegna teknisk brek máttu vit fara tvær ferðir inn á Vestmanna fyrstu tveir dagarnar. Vit tóku støðir norðanfyri og eystur móti Fugloyartunguni og suður á leiðirnar eystan fyri Suðuroyarbanka. Tilsamans tóku vit 87 hál, harav 86 vóru góðkend. Tíverri gloymdu vit at taka punt I 16. Vit landaðu í Havn hósmorgunin 20. august kl. 8. Veðrið var gott allan túrin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Vit fingu minni enn væntað og tal av nytrum var lægri enn ætlað fyri øll fiskasløgini tosk, hýsu og upsa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 20. august. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 15. oktober.

**Úrslit fyri túr 2030 og 2032 undir einum (199 hál, sí Mynd 1):** Eftir at toskurin kom fyri seg aftur í 2017, hevur nøgdin verið minkandi og er nú komin niður á eitt lágt støði. Tann nógva hýsan er eisini í minking. Nakað tað samað var fingið av upsa, meðan tað var nógv at fáa av hvítingi og blálongu í mun til onnur ár. Magakanningarnar vístu, at tað var sera lítið til av nebbasild. Eisini var lítið etið av hvítingsbróðri og krabbadýrum á botni. Í tráð við hetta vóru bæði toskur og hýsa rak í mun til onnur ár. Ein glotti er møguliga, at tað var nógv til av smáum svartkjafti, sum er góð føði. Ein merktur toskur var fingin aftur á túri 2030 og eingin á túri 2032.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur (aldrar) og magar tikin á túri 2032, tilsamans 86 hál.

| FISKASLAG | KG | NYTRUR | MAGAR |
|---|---|---|---|
| HÝSA | 24572,100 | 380 | 170 |
| SVARTKJAFTUR | 3918,935 | 5 | 4 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 3612,441 | | |
| UPSI | 2559,317 | 384 | 88 |
| GULLLAKSUR | 2105,876 | 0 | 0 |
| HVÍTINGUR | 1671,839 | 15 | 8 |
| TOSKUR | 1645,229 | 308 | 102 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 917,082 | | |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 808,569 | | |
| BLÁLONGA | 733,534 | 36 | 22 |
| LONGA | 731,731 | 42 | 7 |
| TUNGA | 264,657 | | |
| REYÐSPRØKA | 175,526 | | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 135,976 | | |
| KNURRHANI | 133,478 | | |
| SILD | 123,801 | | |
| SVARTKALVI | 94,911 | 8 | 0 |
| HEMARI | 90,000 | | |
| TRANTKONGAFISKUR | 78,480 | 5 | 3 |
| BROSMA | 70,351 | 5 | 4 |
| TINDASKØTA | 68,367 | | |
| SANDSPRØKA | 67,550 | | |
| LÝRUR | 63,305 | | |
| HAVTASKA | 35,485 | | |
| LÍTLABROSMA | 35,299 | | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 32,477 | | |
| GAMAL FISKUR | 30,284 | | |
| OSTUR GEODIA SP | 21,494 | | |
| JÁKUPSSKEL | 21,081 | | |
| MAKRELUR | 13,236 | | |
| ØÐA | 12,629 | | |
| HVALSPÝGGJ | 11,758 | | |
| SKØTA (BATIS) | 11,660 | | |
| IGULKER | 8,118 | | |
| ÚLVFISKUR | 7,329 | | |
| HVASSASPREK | 6,444 | | |
| KLINGRUSKØTA | 4,437 | | |
| SILVURMURTUR | 4,421 | | |
| KALVI | 3,025 | 1 | 1 |
| PRIMNOA RESEDAEFORMIS | 3,000 | | |
| ÚLVFISKABRÓÐIR | 2,565 | | |
| TRÆLSRASSUR | 2,319 | | |
| STEINBÍTUR | 1,910 | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| GÁGGA | 1,849 | | |
| MATHØGGUSLOKKUR | 1,716 | | |
| STEINAR(<20CM) | 1,626 | | |
| GÁGGA(DEYD) | 1,211 | | |
| KROSSFISKUR ASTERIIDAE | 0,512 | | |
| STÓRA LAKSATOBIS | 0,435 | | |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 0,324 | | |
| KRØKILSKRUTT | 0,17 | | |
| ELEDONE | 0,143 | | |
| MAKRELGEDDA | 0,136 | | |
| LÍTLA LAKSATOBIS | 0,136 | | |
| NEBBASILD | 0,095 | | |
| RÆKJA | 0,033 | | |
| TILSAMANS | 44920,420 | 1189 | 409 |

**Mynd 1. Úrslitini niðanfyri eru fyri allar 199 støðirnar á føroyska landgrunninum (túr 2030 og 2032).**









**Viðmerkingar:** Smálutir av ymsum slagi eru skrivaðir í Tur2032d.txt. <u>Petur Steingrund</u>